Visjónstorg

# Aðalstýrini í ein bygning

**Í dag var fundur í Visjónstorgingum, har samfelagsbygnaðurin var viðgjørdur. Fyrsta evnið var almenni bygnaðurin, har uppskoti var at miðfyrisitingin skal savnast á einum stað**



VISJÓN 2015
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Fyri samlaða økið samfelagsbygnaður hevur strategibólkurin lagt hesa visjón:

Føroyar – ein vitanarberandi, opin og burðardyggur marknaðarbúskapur við grundfesti í vælferðarsamfelagnum, har avgerðir og ábyrgd eru nær borgaranum, og uppgávurnar verða loystar við størst møguligari virðisskapan.

Evnið samfelagsbygnaður er býtt sundur í seks arbeiðsøki. Tey eru almenni bygnaðurin, býtið millum alment og privat, býtið millum land og kommunur, kapitalmarknaður, skatta- og avgjaldspolitikkur og studningsskipanir.

### Almenni bygnaðurin

Evnið á fyrstu framløguni var almenni bygnaðurin. Hilmar Høgenni úr strategibólkinum fyri samfelagsbygnað stóð fyri hesi framløgu.

Viðvíkjandi almenna bygnaðinum er visjónin hjá strategibólkinum henda:

Lóggávan og almenna umsitingin verða miðvíst skipað soleiðis, at tey hóska til eitt land við áleið 50.000 íbúgvum. Almenni geirin skal á besta hátt veita borgarum og fyritøkum skjóta og góða tænastu.

Strategibólkurin hevði sett sær fylgjandi mál, ið skulu gera tað møguligt at røkka visjónini.

1. Miðfyrisitingin verður savnað á einum stað. Talið av umsitingarligum eindum verður minkað munandi.
2. Í 2010 er mál- og avriksstýring sett í verk fyri alla landsfyrisitingina.
3. Árini 2007-2010 verður skipað strategisk førleikamenning sett í verk fyri alla landsfyrisitingina.
4. Lóggávan skal endurskoðast við atliti til at verða tillagað umsitingarligu orkuni. Altjóða lóggáva eigur at verða sett í gildi á økjum, har hetta er neyðugt.

Byrjað verður at savna miðfyrisitingina í 2007, tá teir stovnar, ið eru undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum og løgmansskrivstovan leggja saman. Tá tosað verður um avriksstýring, er ætlanin at fyrisitingin skal hava bæði faklig og fíggjarlig mál, heldur enn at tað er sum í dag, tá einans verður fokuserað uppá at halda játtanina. Tað skal eisini fokuserast uppá, hvat borgarin fær fyri skattakrónurnar.

### Aðalstýrini savnaði

Eftir framløguna var møguligt hjá teimum ið sótu í visjónstorginum at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Fyrsta evnið í orðaskiftinum var um, hvat liggur í, at miðfyrisitingin skal savnast á einum stað. Visjónin er, at øll aðalráðini fysisk skulu savnast á einum staði, at tey skulu sita í einum bygningi. Í dag sita umleið 150 fólk í miðfyrisitingini, um tey øll skulu sita í saman bygningi, er neyðugt at gera ein nýggjan bygning, har pláss er fyri øllum. Ein íløga uppá umleið 100 milliónir, skal verða gjørd uppá tann bygningin.

Ymiskar meiningar vóru um, hvørt tað var eitt gott hugskot at savna øll aðalráðini, í einum bygningi. Argumentini fyri at savna miðfyrisitingina vóru, at man kann hugsa um tað fakliga, at man á henda hátt kann trekkja uppá servitanina hjá hvørjum øðrum, og at man kann sleppa undan dupultfunktiónum. Tað hevði verið meira natúrligt at arbeitt saman um ymisk mál, tá øll sótu í sama bygningi.

Tey, ið ikki hildu, at tað var so skilagott at savna miðfyrisitingina á einum stað, ávaraðu ímóti, at tað kann blíva ov kollegialt, og mintu á at hyggja eftir bygnaðinum í ráðunum. Men eingin ætlan er at gera nakra bygnaðarliga broyting, ætlanin er bert at savna ráðini fysiskt.

Samanborið var við Bruxelles, har sami bygningur hýsir allari ES kommissiónini, samstundis við at hvørt stýri hevur hvørt sínar kjarnufunktiónir.

Tað tyktist, sum øll í visjónstorginum hildu tað hevði verið ein góð tænasta fyri borgaran, um allir teir hægstu myndugleikarnir vóru at finna á einum staði, og at øll aðalráðini samstundis høvdu eitt felags telefonnummar, har ein kann koma í kontakt við teir. Onkur setti tó spurnartekin við, hvussu ofta vanligi borgarin hevur brúk fyri at fáa fatur á aðalráðunum.

---

Visjónstorg

# Einskiljið tað, ið betri loysir seg privat

**Alt alment virkssemi, ið kann verða betri rikið eftir marknaðartreytum, skal einskiljast. Hetta var ein av høvuðsboðskapunum viðvíkjandi býtinum millum alment og privat á Visjónstorginum í dag**

VISJÓN 2015
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Onnur framløgan á fundinum var um býtið millum alment og privat. Visjónin hjá strategibólkinum fyri samfelagsbygnað er:

Allar samfelagsligar uppgávur skulu loysast soleiðis, at størst møgulig virðir verða skapað. Tað almenna skal røkja tær uppgávur, ið eru neyðugar fyri at tryggja vælferðarsamfelagið. Harumframt skal tað almenna hava eftirlit við at fyritøkur lúka krøv viðvíkjandi dálkingarvanda, arbeiðsumstøðum, kappingarreglum og líknandi. Tað privata tekur sær av teimum økjum, ið kunnu røkjast eftir marknaðartreytum.

Málini stratigibólkurin hevur sett fyri at røkka hesi visjón eru:

1. Tað almenna eigur ikki at reka virksemi, ið kann verða rikið betur eftir marknaðartreytum. Miðvíst eigur at verða skipað fyri, at tílíkt virksemi verður einskilt ella útveitt.
2. Verandi einskiljingartilgongd skal vera framd innan 3 ár.
3. Aðrar almennnar fyritøkur og stovnar (Jarðargrunnurin, Húsalánsgrunnurin os.fr.), hvørs virksemi natúrliga hoyrir heima í privata geiranum, skulu verða einskildir.
4. Fyri at skapa innlit í hvørjiárin teir vinnurekandi grunnarnir hava á føroyska búskapin, skal ein kanning setast í verk.
5. Tað almenna skal umsita sítt náttúrutilfeingið soleiðis, at størst møgulig virði verða skapað.

Eftir framløguna var orðaskifti um einskilјing, løgmaður legði út við at minna á, at alt tað privata fór á heysin undir kreppuni í 1990unum. Hann ávaraði ímóti hugsanini, at um alt verður einskilt, so verður alt gott.

Svarið úr strategibólkinum var, at tað almenna skal hava øll síni kjarnuøki eftir, men at alt hitt skal einskiljast. Tað almenna skal nýta sína orku uppá tað tey eru best til, og lata tað privata um hini økini, til dømis øki sum kunningartøkni, viðlíkahald, reingerð, telefon samskifti. Hesi tænastu skulu leggjast út til tað privata fyri at skapa kapping.

Bjarni Djurholm spurdi um, hvat liggur í punkt 5, um at tað almenna skal umsita sítt náttúrtilfeingi.

Hetta merkir, at ein ítøkilig avgerð skal takast um, hvussu náttúrutilfeingið skal umsitast, til dømis olja, fiskur, vatn, vindur, alifirðir og jørð tilfeingi. Tað skulu vera fastar reglur fyri umsitinigini av náttúrutilfeinig, og um okkurt av náttúrutilfeinginum skal vera ókeypis, so skal hetta eisini fastsetast.

Á visjónstorginum var nevnt, at tað kann vera vandamikið, at kopiera skipanir úti úr heimi, sum eru gjørdar til eitt nógv størri samfeløg enn tað føroyska. Til dømis var vandin nevndur, um at tað privata neyvan fer at geva nakrar tænastur, sum tað privata ikki kann tjena pengar uppá, og tí er ikki sikkurt, at allar tænastur røkka útjaðarin, sum tí kann fáa stórar trupulleikar. Hetta varð svarað aftur við at tað kann fylgja ein veitingarskilda við hesum uppgávum. Sum dømi var nevnt, at hóast Farmaleiðir eru einskildar, hava tær veitingarskildu til útoyggjarnar.

Jan Mortensen úr Vinnuhúsinum segði, at tað eigur at vera ein spurningur um, hvar uppgávan verður best røkt, heldur enn bara at fokusera uppá hvat skal vera alment og hvat skal vera privat.

## FAKTA

### VISJÓN 2015

**ARBEIÐI FRAMEFTIR:**

- Strategibólkarnir gera uppskot til strategiir
- Arbeiðið hjá teimum 12 vælferðarbólkunum verður samskipað til ett strategipappír
- Strategipappírini verða við telduposti send Visjónstorginium til hoyringar
- Hoyringstíðin verður ein mánað
- Í hoyringstíðini verða hoyringfundir á miðnámsskúlunum
- Almenningurin fær høvi at gera viðmerkingar á heimasíðuni
- Strategibólkarnir viðgera allar viðmerkingar
- Allar strategiir verða savnaðar og handaðar Landsstýrinum í vár

**TÍÐARÆTLAN:**

**Til ummælist síðst í oktober**
- Útbúgving
- Gransking,, menning og nýskapan
- Mentan

**Til ummælis um miðan november**
- Tilfeingi
- Umhvørvi
- KST
- Íverksetan

**Til ummælis fyrst í januar**
- Alheimsgerð
- Samfelagsbygnaður
- Vælferð
- Arbeiðsmarknaður
- Infrakervi